

Transocean Spitsbergen. Mynd: Greenpeace

# Transocean má koyra 150 starvsfólk heim

**Jógvan Hugo Gardar**

09.11.2014 - 17:11

Oljan.fo

Eini 150 starvsfólk hjá Transocean, ið eigur og rekur boripallar um allan heim, missa arbeiði í norska partinum av felagnum.

Leiðslan hevur boða frá at tey arbeiða við málinum., men at tey ikki kunnu lova øllum arbeiði aðrastaðni. Fakfelagið SAFE Transocean hevur boða sínum limum frá at fólk fara at fáa sekkin, men at tey enn ikki vita hvussu nógv.

Offshore.no hevur roknað út at talan helst verður um 150 fólk á teimum báðum boriåallunum sum nú verða tiknir úr norskum sjógvi, Transocean Spitsbergen og Polar Pioneer.

*Transocean hevur virksemi í nógvum londum. Á norska landgrunninum hava tey havt hesar boripallarnar:*

Polar Pioneer (gevst nú í norskum sjógvi)
Transocean Arctic
Transocean Barents
Transocean Leader
Transocean Spitsbergen (gevst nú í norskum sjógvi)
Transocean Searcher
Transocean Winner